


Nýtt stórt úrvæl av trúlovilsis- og giftingarringum.

3 arin

Ur- & Smúkkudeildin tel. 35 35 31 · e-mail: 3-arin@3-arin.com

Reparera bilar
Tryggingarskaðar
Upprætting og lakering

Alt mekaniskt arbeiði og styling til bilar

**Auto-Tek**
Argjaboðagøta 5 ·
Tlf. 321206 · Fax 321236
eftir kl. 17.00 á Tlf. 221006

www.sosialurin.fo

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Søkt verður eftir pedagogum til Stuðulsfólkaskipanina í Tórshavnar Kommunu

Stuðulsfólkaskipanin er partur av sosialu deild í kommununi, hon hevur egnu umsiting og er skipað í tveimum deildum. Serdeildin tekur sær av børnum og ungum við varandi breki, menningartarni o.l. , meðan Familjudeildin tekur sær av børnum, sum hava aðrar trupulleikar.

Søkt verður eftir stuðulspedagogum til báðar deildirnar, 20- 40 tímar um vikuna, 1. septembur ella eftir nærri avtalu.

**Størvini**
Fleiri uppgávur eru:
Eitt nú 30 tímar um vikuna í stuðulstiltakinum "Bridgehúsinum" til ein skúladrong við Down's syndromi, sum hevur tørv á miðvísari samskiftis- og málmennandi venjing.

Ella eitt 25 tímar's starv sama stað til eina seinmenta skúlagentu, sum hevur tørv á nógvum strukturi.

Eitt starv 20 tímar um vikuna er í barnagarðinum á Velbastað at stuðla einum barni í samskifti og samanspæli.

Eisini hava vit fleiri aðrar upgávur úti á dagstovnum, frá 20 til 40 tímar um vikuna. Arbeiðið kann vera við einum ella fleiri børnum sum:
- hava talu- ella samskiftistrupulleikar
- eru í kreppu
- hava SI-trupulleikar
- ikki trívast ella mennast aldurssvarandi
- eru menningartarna, hava Down's syndrom e.l.

Vit kunnu bjóða eitt spennandi og mennandi arbeiði, har tú arbeiðir sjálvstøðugt, men er partur av einum bólki av starvsfelagum og hevur fast samband við ein pedagogiskan ráðgeva.

**Førleikakrøv**
Ynskiligt er, at umsøkjarir hava námsfrøðiliga útbúgving, men verður størsti denturin lagdur á:

- at umsøkjararnir hava royndir við børnum og innan tað sosialpedagogiska arbeiðsøki.
- at viðkomandi hevur hug og evni til at arbeiða við børnum og familjum við serligum tørvi.
- at umsøkjarin er búgvin, kann arbeiða sjálvstøðugt og er opin fyri menning í arbeiðnum.

**Starvs- og setanarviðurskifti**
Starvið kan verða full -ella parttíð og verður lønt sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag, Fíggjarmálastýrið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.
Skipað verður fyri ráðgeving og skeiðvirksemi.

**Meira fæst at vita**
við at venda sær til Birgit Debess, leiðara av Stuðulsfólkaskipanini ella Eyðun Jensen, sosialdeildarleiðara, tlf. 31 51 60.

**Umsókn**
saman við upplýsingum um útbúgving og royndir og møguligum viðmælum skulu vera Tórshavnar kommunu, Postrúm 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 5. august 2002.
Viðmerk á umsóknina "Stuðulspedagogur".

SNARSKIVAN

## Frá Føroya Arbeiðarafelag

### Summarfrí

Skrivstovan er stongd í viku 31
frá 29. juli til 5. august 2002.

Føroya Arbeiðarafelag

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Endurlýsing
## Leiðari til frítíðarskúlan í Badmintonhøllini

Tórshavnar kommuna søkir eftir leiðara, 40 tímar um vikuna, til frítíðarskúlan í Badmintonhøllini at byrja 1. august 2002.

**Stovnslýsing**
Frítíðarskúlin heldur til í egnum hølum í Badmintonhøllini og hevur atgongd til høllina hvønn dag til kl. 15.00. Á stovninum eru 48 børn, sum ganga í 1. flokki í Hoyvíkar skúla.

**Vit bjóða**
eitt áhugavert arbeiði har tú fært møguleika fyri at seta tín dám á stovnin.

**Vit ynskja at umsøkjarin**
- er útbúgvin pedagogur
- hevur leiðsluroyndir
- kann arbeiða sjálvstøðugt og taka avgerðir
- hevur hugsjónir, tá ið tað snýr seg um virksemið í einum frítíðarskúla
- saman við starvsfólkunum er við til at menna tað pedagogiska arbeiðið
- hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan dag við virðing og umsorgan fyri børnum, foreldrum og starvsfeløgum
- kann virka í góðum samstarvi við starvsfelagar og foreldur
- dugir væl at samskifta, bæði innan- og uttanhýsis
- hevur kunnleika til teldur

**Setanarviðurskifti og løn**
sambært sáttmála millum Føroya pedagogfelag og Kommunala arbeiðsgevarafelagið.

**Meiri fæst at vita**
við at venda sær til Katrina Petersen, samskipara, ella Gunnleyg Durhuus, trivnaðarstjóra, tlf. 31 51 60.

**Umsókn**
saman við upplýsingum um útbúgving, royndir og møguligum viðmælum skulu vera Tórshavnar kommunu, postrúm 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 30. juli 2002. Viðmerk á umsóknina "Leiðari til frítíðarskúlan".

SNARSKIVAN

Gravsteinar, kantsteinar og blómubeð
Nú eisini úr Føroyskum gróti
Sosialurin - 311820



Skjót levering
Prísir við litmyndum verða sendir kring landið og til útlandið
Danstein
www.danstein.fo
Tel. 447512
Tel. 217512
Tel. 318323
Fax 449961
RUNAVÍK - R. C. EFFERSØESGØTA 19, TÓRSHAVN



ADC-Heilsølan
Láarvegur 14 - Tórshavn - Tlf. 315828 - Fax 315893
ARBEIÐSHANDSKAR
Til øll endamál – bæði á sjógvi og landi
LANDSINS STØRSTA ÚRVAL
frá eingangshandskum til fóðraðar japan-handskar
ADC
BEINLEIÐIS FRÁ FRAMLEIÐARA

Sosialurin
-tað loysir seg

Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo

## Dagrøktari

Søkt verður eftir dagrøktarmammu til Dagrøktina í Hvalbiar Kommunu at byrja eftir summarfrítíðina.

Tú skalt vera áhugað í at arbeiða við børnum, tú skal gera børnunum ein tryggan og fjølbroyttan gerandisdag. Tú skalt duga at samskifta við foreldrini.

Áhugað kunnu venda sær til Súsonnu Poulsen, dagrøktarleiðara, tlf. 371339.



Lesið internet Sosialin !




Sosialurin
-tað loysir seg

STRANDFARASKIP LANDSINS

***Í sambandi við, at nýggj ferðaætlan er komin út, eru ymiskar tillagingar framdar, sí niðanfyri. Hesar eru galdandi frá mánadegnum 15. juli 2002***

***Tillagingar til ferðaætlanina 2002***

**Leið 50 (síðu 10)**
Túrurin av Klaksvík kl. 11:45 hevur ikki busssamband dag 6
Túrurin av Klaksvík kl. 14:45 hevur ikki busssamband dag 7
Túrurin av Klaksvík kl. 16:15 hevur ikki busssamband dag 6
Túrurin av Klaksvík kl. 19:15 hevur ikki busssamband dag 7

**Leið 50 (síðu 11)**
Túrurin av Fuglafiði kl. 06:15 skal broytast til kl. 06:00
Túrurin av Klaksvík kl. 07:30 skal broytast til kl. 07:10

**Leið 56 (síðu 12)**
Túrurin av Klaksvík kl. 10:15 dag 1 og 3 skal broytast til kl. 10:45

**Leið 200 (síðu 22)**
Túrurin av Eiði kl. 15:40 skal broytast til kl. 15:30
Túrurin av Eiði kl. 16:30 verður ikki koyrdur longur
Túrurin av Eiði kl. 17:15 skal broytast til kl. 17:00
***Tilkalling skal verða í seinasta lagi 2 tímar áðrenn fráferð***

**Leið 202 (síðu 23)**
Túrurin úr Tjørnuvík kl. 06:25 er eftir tilkalling
Túrurin úr Tjørnuvík kl. 07:20 skal broytast til kl. 07:10
Túrurin úr Tjørnuvík kl. 15:40 skal broytast til kl. 15:30
Túrurin úr Tjørnuvík kl. 16:30 verður ikki koyrdur longur
Túrurin úr Tjørnuvík kl. 17:15 skal broytast til kl. 17:00
***Tilkalling skal verða í seinasta lagi 2 tímar áðrenn fráferð***

**Leið 400 (síðu 26)**
Allir túrar úr Tórshavn og úr Kollafirði skulu flytast 5 min framm/fyrr
Túrurin úr Tórshavn kl. 18:30 skal vera dag X og 7 (6 talið skal vera 7 tal)

**Leið 440 (síðu 27)**
Túrurin av Søldafirði kl. 19:35 verður ikki koyrdur dag X og 6, men ístaðin dag X og 7

**Leið 440 (síðu 28)**
Túrurin av Toftum kl. 17:00 skal hava X ístaðin fyri 5.
Túrurin av Toftum kl. 19:20 verður ikki koyrdur dag X og 6, men ístaðin dag X og 7

**Leið 442 (síðu 29)**
Túrurin kl. 07:25 úr Æðuvík, Rituvík og Glyvrum verður ikki koyrdur longur.

**Leið 480 (síðu 30)**
Túrurin av Strondum kl. 19:05 verður ikki koyrdur dag X og 6, men ístaðin dag X og 7
Túrurin kl. 07:20 er kl. 07:15 skúladagar og 07:30 aðrar dagar.

**Leið 480 (síðu 31)**
Túrurin av Skálabotni kl. 19:25 verður ikki koyrdur dag X og 6, men ístaðin dag X og 7

**Leið 481 (síðu 32)**
Undir leiðina Oyndarfjørður - Skálabotnur skal vera: *(Av Hellunum-Úr Oyndarfirði-Úr Skálabotni)*
Túrurin av Skálabotni kl. 18:40 verður ikki koyrdur dag 7, men ístaðin dag 6
Túrurin av Skálabotni kl. 19:25 verður ikki koyrdur dag X og 6, men ístaðin dag X og 7

**Leið 700 (síðu 39)**
Túrurin kl. 12.30 av Tvøroyri og víðari, har skulu allar tíðirnar flytast 15 min framm.
Túrurin av Drelnesi kl. 12:45(12:30 aftaná broyting) skal einans vera dag 3.

**Leið 703 (síðu 42)**
Túrurin av Tvøroyri kl. 09:15 er eftir tilkalling

